# Teir kunnu ikki revsast

(KLAKSVÍK) Hóast teir verða funnir sekir í drápsroynd ella øðrum lógarbroti, kunnu dreingirnir, sum skutu eftir løgreglumonum og øðrum fólki í Klaksvík sunnukvøldið, ikki revsast.

- Tað ber ikki til at revsa nakran, sum er undir 15 ár, og tí kunnu hesir dreingirnir ikki revsast, hóast talan er um eitt álvarsmál, sigur Sigmund Poulsen, løgfrøðingur.

- Lógin sigur, at drápsroynd skal revsast eins hart og eitt dráp, men ofta verður revsingin niðursett, tá talan er um drápsroynd. Harafturat kunnu onnur viðurskifti hava ávirkan á revsingina, men í útgangspunktinum er revsingin úr fimm árum og uppeftir.

### Barnaverndin uppí

Tá slík mál sum við teimum ungu dreingjunum í Klaksvík stinga seg upp, fær Barnaverndin ein sentralan leiklut. Barnaverndin skal verða við til avhoyringarnar, og ofta er tað hon, sum skal taka um endan í slíkum málum.

Barnaverndin var eisini við til avhoyringarnar, sum vóru á løgreglustøðini í Klaksvík sunnukvøldið og mánanáttina.

- Tey, sum eru undir 15 ár, hava øll tey vanligu rættindini, sum fólk hava, tá løgreglan skuldsetir tey. Men tá tað ikki ber til at revsa tey fyri nakað lógarbrot, ber sjálvsagt heldur ikki til at varðhaldsfongsla tey, sigur Sigmund Poulsen.

- Tað er eitt rættiligt álvarsmál, um fólk verða funnin sek í drápsroynd, men er tann seki undir 15 ár, so fellir øll revsing burtur, sigur hann.

**ek**



*Fleiri av húsunum í grannalagnum vóru rakt, og nógvir rútar brotnaðu. Serliga grannahúsini sunnanfyri, har skotið varð, fingu stóran skaða. Trý skot vórðu skotin inn ígjøgnum vindeygu í húsunum, umframt at fleiri skot eisini raktu betonggrundina*

# Umfatandi skaðar

*Bilar og sethús fingu skaða, tá skotið varð við skørpum í Klaksvík sunnukvøldið*

(KLAKSVÍK) Umfatandi skaðar stóðust av skottilburðinum í Klaksvík sunnukvøldið.

Tveir løgreglubilar og ein persónbilur, ið kom framvið, vóru raktir av skotum. Serliga harðliga gekk tað útyvir teir báðar løgreglubilarnar, sum nærum vórðu skotnir í sor. Skotið var hol bæði á rútar og dekk, umframt at meiri enn 30 skothol vóru í skrokkinum á tí eina av løgreglubilinum.

Av politistøðini frættist, at hvørgin bilurin koyrir eftir skottilburðin, og at teir hava verið noyddir at læna ein bil úr Havnini.

Eisini fleiri av húsunum í grannalagnum vóru rakt, og nógvir rútar brotnaðu. Serliga grannahúsini sunnanfyri, har skotið varð, fingu stóran skaða. Trý skot vórðu skotin inn ígjøgnum vindeygu í húsunum, umframt at fleiri skot eisini raktu betonggrundina.

Eitt skot fór gjøgnum vesvindeygað á loftinum, og tvey gjøgnum køksvindeygað við tí úrsliti, at skotini gjørdu skaða á innbúgvið. Tað eina skotið fór lúkst inn gjøgnum veggin millum stovuna og køkin. har skotið, áðrenn tað endaði uppi undir loftinum í sunnara enda av húsinum, gjørdi skaða á bæði stovuborðið, ein stól og knústi eina glashurð.

### Kanska endurgjaldskrav

Fleiri av hinum húsunum í grannalagnum vóru eisini rakt. Fleiri rútar brotnaðu, umframt at hol eisini kom á tekjuna á onkrum av húsunum.

Eisini longur burtur frá staðnum, har tilburðurin fór fram, stóðst skaði av skotunum. Klaksvíkar Sjómansheim sum liggur einar 400 metrar frá staðnum, har skotini vóru latin av, varð eisini rakt. Vindeygað í hjúnarrúminum hjá fyristøðufólkunum var skotið inn, og kúlan endaði í kamarshurðini. Til alla lukku var eingin staddur inni í kamaranum, tá skotið varð ígjøgnum vindeygað.

Enn er eingin endalig uppgerð gjørd yvir skaðarnar, sum stóðust av skottilburðinum, og ikki er vist, at alt er komið undan kavi enn. Sosialurin hevur verið í samband við annað av tryggingarfeløgunum, og har siga tey, at skaðar á ogn, sum er umfatað av teirra pakkatrygging, elvdir av skotum, eisini verða endurgoldnir av hesi trygging. Tó kunnu hann ella tey, sum elva til slíkan skaða vænta sær endurgjaldskrav frá trygginginarfelagunum.

# Vápnini vóru ólóglig

*Tá teir fýra ungu dreingirnir í Klaksvík sunnukvøldið fóru at skjóta til máls eftir bilum og fólki, var tað ikki við vanligum høglbyrsum, men ólógligum riflum*

(KLAKSVÍK) Sundirskotnir løgreglubilar, brotnir rútar og uppgataðir húsaveggir, bera boð um, at tað gekk harðliga fyri seg, tá fýra ungir dreingir fóru at skjóta til máls eftir bilum og fólkum á Brekku í Klaksvík sunnukvøldið.

Politiið í Klaksvík váttar, at ólóglig vápn vóru uppi í vandamikla leikinum, tó vilja teir ikki siga, hvat slag ella hvussu nógv vápn, teir hava lagt hald á. Tó verður sagt av politistøðini, at talan var um riflur og ikki vanligar høglbyrsur.

Dreingir høvdu fingið hendur á vápnunum og lóðrinum í einum húsum hjá einum skyldmanni hjá einum av dreingjunum. Hesin maður hevði eftir øllum at døma fleiri riflur og lóður til hesar liggjandi í húsinum hjá sær.

Riflur eru kraftmikil skotvápn, sum kunnu drepa fólk heilt upp til 800 metrar haðani skotið verður latið av. Hesar riflur eru strangliga bannaðar at eiga og brúka í Føroyum.

### Ólógligu vápnini

Skottilburðurin í Klaksvík setur av nýggjum ljóskastaran á spurningin um tey ólógligu vápnini, fólk kring landið liggja inni við.

Ein partur av hesum ólógligu skotvápnum eru komin til landið við føroyskum sjómonnum, sum hava siglt í Grønlandi og New Foundlandi, har hesi vápn eru fult lóglig og kunnu fáast til keyps av einum hvørjum, ið hevur áhuga at ogna sær eitt av hesum vápnum.

Føroyska vápnalógin loyvir bert vanligum høglbyrsum. Hetta eru byrsur, sum lógliga kunnu keypast av fólki, sum eru yvir átjan ár og verða nýttar til veiðu av fugli og øðrum. Hesar høglbyrsur mugu heldur ikki kunna skjóta meiri enn tvey skot, áðrenn tær skulu løðast av nýggjum.

### Strangar lógir

Tó eru undantøk í vápnalógini. Eitt nú kunnu alibrúk fáa undantaksloyvi til at liggja inni við riflu til at verja seg ímóti eitt nú kópi, sum ger seg inn á aliringar. Strangar reglur eru tó fyri hesum vápnum. Loyvi er bert at nýta riflurnar innan fyri eitt ávíst øki, og serligt loyvi skal havast frá politinum, hvørja ferð alibrúkini skulu hava nýggj skot til hesar riflur.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa nakra viðmerking hvørki frá politinum ella fútanum um hvørja revsing tey, ið liggja inni við ólógligum vápnum, kunnu vænta sær fyri hetta, ella hvat er rætt mannagongd, um tú hevur hug at burturbeina ólóglig vápn.

# Telefonin gløddi

(KLAKSVÍK) Mánamorgunin var trupult at sleppa ígjøgnum til Hans Djurhuus, sýslumann í norðoyggjum. Allan fyrrapartin gløddi telefonin á løgreglustøðini, tí fjølmiðlar í Føroyum og uttanlands vildu hava fatur á honum.

Danskir fjølmiðlar frættu mánamorgunin um hendingina í Klaksvík, og teir stóðu í kø fyri at fáa fatur á løgregluni í Klaksvík.

Longu mánamorgunin hevði Jyllands-Posturin fyrstu greinina um skottilburðin í Klaksvík, og øll tey stóru donsku bløðini og sjónvarpsstøðirnar leitaðu eftir upplýsingum í Klaksvík í gjár.



# Klaksvíkingar rýma undan presti



*Misnøgdin við prestarnar í Klaksvík er so stór, at fólk rýma undan teimum og fara aðrastaðni í kirkju. Prestarnir hava tømt Christianskirkjuna við sínum prædikum, har persónligt klandur við biskuppin alla tíðina skínur ígjøgnum*

EDVARD JOENSEN

So stór er misnøgdin við prestarnar í Klaksvík, at vanlig kirkjufólk beinleiðis rýma undan teimum. Prestarnir hava prædikað Christianskirkjuna tóma við prædikum, sum litaðar eru av egnum klandurssemi.

Soleiðis sigur Asbjørn Lómaklett, sum er ein teirra, ið stendur aftan fyri undiskriftainnsavningina, sum fer fram í Klaksvík um dagarnar.

Hann sigur, at hann er púra samdur við konuni, sum í Útvarpinum í seinastu viku segði, at prestarnir í Klaksvík hava prædikað kirkjuna tóma. Vanligt var fyrr, sigur hann, at eini 300-400 fólk komu í kirkju í Klaksvík ein vanligan sunnudag. Nú er tali fallið til umleið helvtina. Prestarnir hava stygt fólk burtur við síni fundamentalistisku framferð.

Misnøgdin við prestarnar í Klaksvík er so stór, at nógv fólk fara bara í Christianskirkjuna, tá lestur verður lisin. Aðrar dagar fara tey aðrastaðni í kirkju. Eitt nú til Viðareiðis, sigur Asbjørn Lómaklett.

Nú er komið so vítt, at krkjufólk í Klaksvík beinleiðis heita á Føroya biskupp um at taka teirra egnu prestar av ræði.

Asbjørn Lómaklett í Klaksvík, hevur sjálvur fyrr verið deknur í Christianskirkjuni. Hann sigur, at tað tó er sum vanligur kirkjugangari, hann er við í hesum tiltakinum, og at hendingin við Viborg bispinum bert var dropin, sum fekk bikarið at flóta yvir. Hann sigur, at áheitanin á Føroya biskup um at fáa Karsten Nissen, biskup í Viborg, til Klaksvíkar á hvítusunnu, er ein máti at vísa, at tað eru aðrar meiningar í kirkjuliðnum í Klaksvík, enn tær fundamentalistisku, sum prestarnir og partur av kirkjuráðnum umboða.

Hesi, sum nú skriva undir, halda tað vera stóra skomm fyri Klaksvíkina at sýta donskum biskuppi atgongd til kirkjuna, tí prestarnir har klandrast við teirra egna biskupp.

Tey, sum savna undirskriftir, hava ikki fínkembt Klaksvíkina, sigur Asbjørn Lómaklett. Tey eru bara farin til fólk, sum tey vita vanliga plagdu at ganga í kirkju. Og eingin ivi er um, heldur hann, at onkur er lopin um, sum annars hevði havt skrivað undir. Umleið 500 undirskriftir eru higartil savnaðar, og tær verða sendar bispi fyrsta dagin. Tey, sum skrivað hava undir áheitanina á biskupp, eru øll fólk yvir 18 ár.

Asbjørn Lómaklett sigur, at kirkjufólk í Klaksvík eru vorðin kedd av, at prestarnir sunnudag eftir sunnudag brúka prædikustólin til at leggja egnar meiningar um klandur teirra við biskuppin út. Prædikurnar eru heilt greitt litaðar av prestanna persónligu sjónarmiðum, og boðskapurin, teir annars áttu at lagt út, dettur líkasum burturímillum. Hóast teir ikki nevna nøvn, er eingin ivi hjá kirkjufólkinum um, hvat teir vilja við sínum prædikum. Og tað tíma fólk heilt einfalt ikki at hoyra longur, sigur Asbjørn Lómaklett.

# Sera gott ár hjá Maersk Air

*Tað var ein nøgd Maersk Air leiðsla, sum hósdagin legði besta úrslitið hjá felagnum nakrantíð fram á tíðindafundi í Dublin*

EDVARD JOENSEN
ÚR DUBLIN

Maersk Air hevði í 1999 eitt yvirskot upp á 648 milliónir krónur áðrenn avskrivingar. Nettoúrslitið var 112 milliónir danskarkrónur.

Tað var ein nøgd leiðsla í Maersk Air, sum legði hesi tølini fram á pressufundi í Dublin hósdagin.

Um Føroyarutuna segði forstjórin í Maersk Air, Ole Dietz, í samrøðu við Sosialin, at har er ferðafólkatalið vaksandi í sama mun, sum búskaparstøðan í Føroyum batnar.

Um kappingina, sum nú er íkomin millum feløgini, sum flúgva til Føroya, segði hann hann, at hon verður verðandi. Maersk Air fer at kappast við Atlantsflog um ferðafólkini til Føroya. Men tað verður á handilsligum grundarlag. Og hann legði dent á, at tað avgjørt er pláss fyri báðum feløgunum. Ferðfólkatalið er til tvey feløg, segði Ole Dietz við Sosialin í Dublin hósdagin.

Maersk Air fer als ikki á nakran hátt at royna at troðka Atlantsflog út av rutuni, hóast Maersk Air er nógv sterkari fíggjarliga, enn Atlantsflog er, segði Ole Dietz.

# Royal Greenland fer úr Føroyum

*Royal Greenland letur skrivstovuna í Havn aftur. Handilssambandið til Føroyar verður í framtíðini stýrt úr Aalborg*

Skrivstovan hjá Royal Greenland yviri við Strond í Havn verður nú afturlatin.

Erland Søndergaard frá rakstrareftirlitinum hjá Royal Greenland, sigur við Tíðindablaðið Sosialin, at leiðslan í fyritøkuni hevur gjørt av at broyta bygnaðin soleiðis, at deildin í Føroyum verður afturlatin. Handilssambandið við føroyskar fiskaseljarar og onnur viðskiftafólk verður í framtíðini røkt úr Aalborg, har høvuðsskrivstovan er.

Eitt fólk hevur starvast hjá Royal Grennland í Føroyum, og tað fólkið er sagt úr starvi.

Erland Søndergaard sigur, at hann er komin til Føroya at avgreiða flytingina á ein skilagóðan hátt. Hann sigur seg vera komnan hendan vegin at gjalda tær rokningar, sum liggja, soleiðis, at farið kann vera úr Føroyum við skili, sum hann tekur til.

Eingin dagur er ásettur fyri, nær latið verður aftur. Tað verður, tá tað er »praktiskt gjørligt«.

**ej**

Flymo
Sláimaskinur



Vit hava eisini:
• Urtagarðshegn
• Trillubørur
• Urtagarðsamboð




P/f Thomas Dam á Hálsi Wholesale
Heykavegur 1 • 100 Tórshavn • Tel. 311400 • Fax 315574
th-dam@post.olivant.fo

Sosialurin - 311820